# Kommunusamskipanin stóran samfelagsligan týdning

**Stóra og umfatandi lógararbeiðið, sum verður gjørt í dag av landsstýrinum og sum skal setast í verk av løgtinginum, krevur stórt hegni fyri at tillaga lógirnar til okkara samfelag, so tær verða landið og fólkið at gagni. Í hesum sambandi hevur KSF ein týðandi leiklut, tá felagsskapurin í stóran mun er við í arbeiðnum og kann gera viðmerkingar til lógaruppskotini, áðrenn hesi fara í løgtingið fyri at verða samtykt og sett í verk**



NÝGGJÁRSGREIN
*Jógvan Krosslá, formaður*

Kommunusamskipan Føroya – KSF, er ein kommunufelagsskapur, ið er stovnaður av Tórshavnar- Klaksvíkar- Runavíkar- Tvøroyrar- Fuglafjarðar- og Vágs kommunum við endamálinum at virka fyri felags áhugamálum og størri kommunalum sjálvræði.

Kommunufelagsskapurin umboðar nærum 70% av íbúgvaratalinum í Føroyum og tekin eru um, at felagsskapurin fer at vaksa enn meiri, tá aðrar kommunur hava víst áhuga at gerast limir.

Upprunin til kommunufelagsskapin skal síggjast í ljósinum av kreppuárunum í 90,unum, tá kommunurnar vóru fíggjarliga illa fyri og roynt var at umfíggja tey lán, sum kommunurnar høvdu upptikið í teimum sonevndu góðu tíðunum, men ikki megnaðu at gjalda aftur, tá kreppan tók seg upp. Bankar fóru á húsagang og arbeiðsloysi var sera stórt um alt landið og hevði við sær at fíggjarstøðan hjá kommununum var sera vánalig – hjá nøkrum verri enn hjá øðrum.

Neyðugt var tí hjá kommununum at fáa umfíggingina uppá pláss og varð hetta gjøgnumført í 1995 við einari felagsavtalu millum hesar kommunur, sum í dag myndað felagsskapin KSF og lánsveitararnar.

Felagsavtalan um kommunuskuldina og tað samstarv, sum varð bygt upp í hesum tíðum, varð mett at vignast so væl, at ynskiligt var at halda fram við samstarvinum og sum førdi við sær stovnaðin av felagsskapinum 10. juni 1999.

Kommunusamskipan Føroya byggir felagsskapin um hægst 9 eindir ella økir, sum kommunuálitið byggir á og sum er nevnt í gul/grønu »Niðurstøða og tilmæli« frá kommununevndini í sept.1998. Hetta merkir ikki, at felagsskapurin byggir virksemi sítt á kommunusamanleggingar, men heldur leggur stóran dent á fáa kommunurnar at samstarva í størri eindum fyri at styrkja nærumhvørvið og virka fyri, at avgerðirnar verða tiknar so nær borgaranum sum gjørligt.

Sentraliseringin, sum fer fram um allan heimin, har alt virksemi og við tí sum harav fylgir, flytir til høvuðsstaðarøkini, er eisini galdandi hjá okkum. Sjálvsagt eru vit góð við okkara høvuðsstað og skulu skapa møguleikar fyri at hann er vælvirkandi sum høvuðsstaður, men er eisini rætt at arbeiða fyri, at fólk framvegis verður búgvandi úti um landið og skapa fyritreytir fyri hesum. Vit eiga nógv vælútbúgvin fólk og eiga tí eisini at skapa møguleikar fyri, at hesi kunnu virka í teim økjum, har tey sjálvi búgva.

Kommunusamskipanin arbeiðir í løtuni saman við landsstýrinum um at fáa greitt ábyrgdarbýti millum land og kommunur og í hesum sambandi verður virkað fyri, at fleiri málsøkir verða flutt frá landsumsitingini til kommunurnar at umsita. Fyri at kommunurnar skulu hava førleika at umsita stór og tung málsøkir, sum t.d. skúlamál, heilsumál og sosialmál fyri at nevna nøkur, so er neyðugt hjá kommununum at samstarva um hesi málsøkir í hóskandi eindum.

Tá kommunurnar yvirtaka málsøkir frá landinum at umsita, so merkir tað samstundis, at kommunurnar gjalda har tær valda. Út frá hesum verður eisini fylgt neyvt við, hvussu býti verður millum land og kommunurnar av skattapeninginum, sum skal brúkast til hesa umsiting. Tá landið kemur at umsita minni og kommunurnar meiri, so er greitt, at skattapeningur borgarans lutfalsliga verður býttur eftir umsiting og ábyrgd og merkir hetta, at lutfalsliga verður goldið meiri í kommunuskatti og minni í landsskatti, tó uttan at samlaði skatturin verður øktur.

Við hesum verður skattapeningurin í størri mun, brúktur nærri borgaranum og í tí økið, sum hann býr í.

»Við lóg skal land byggjast« og vísandi til stýrisskipanarlógina, verða flest allar lógir broyttar soleiðis, at miðað verður ímóti einum sjálvstýrandi samfelag og eru vit soleiðis í einari stórari broytingartíð.

Stóra og umfatandi lógararbeiðið, sum verður gjørt í dag av landsstýrinum og sum skal setast í verk av løgtinginum, krevur stórt hegni fyri at tillaga lógirnar til okkara samfelag, so tær verða landið og fólkið at gagni. Í hesum sambandi hevur KSF ein týðandi leiklut, tá felagsskapurin í stóran mun er við í arbeiðnum og kann gera viðmerkingar til lógaruppskotini, áðrenn hesi fara í løgtingið fyri at verða samtykt og sett í verk.

Kommunustýrislógin, ið var sett í gildi 1. januar 2001, setir sera stór krøv til bý- og bygdarráðslimirnar, sum persónliga kunna hefta fyri gjørdar samtyktir, sum teir hava verið við til og uttan at neyðug játtan fyriliggur til útinnanina av samtyktini. Herumframt eru krøvini bæði til kommunalpolitikkaran og umsitinga vorðin alt størri – bæði frá tí einkulta borgaranum, sum av samfelagnum sum heild.

Í februar mánað í ár, skipaði KSF fyri, at allir býráðslimirnir í limakommununum komu á skeið í Grenå við serligum atliti til nýggju kommunustýrislógina, har býráðslimirnir vórðu kunnaðir um arbeiðið sum kommunustýrislimur, hvørja ábyrgd nevndarlimir og serliga nevndarformenn hava sambært nýggju stýrisskipanarlógini. Flest allir býráðslimirnir vóru á skeiðnum, sum varð mett at vera gott og gevandi fyri hvønn einstakan luttakara.

Tað er m.a. hetta, sum KSF arbeiðir fyri og sum verður lagt í týdningin av at virka fyri felags áhugamálum og størri kommunalum sjálvræði.

Allar kommunur kunnu søkja um limaskap í Kommunusamskipan Føroya – KSF og verður ein møgulig umsókn løgd fyri aðalfund, sum er í mars mánað á hvørjum ári.

Kommunussamskipanin hevur fingið sær skrivstovu og fundarhølir í Lucas Debesargøtu í Tórshavn og hevur sett skrivara í starv at samskipa arbeiðið hjá felagsskapinum og vil hetta soleiðis kunna viðvirka fyri at røkka endamálinum hjá KSF.

Kommunusamskipan Føroya – KSF vil nýta høvi til at ynskja øllum eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

# Fiskimannafelagið sagt sáttmálan upp

**Verður tikið samanum, kann sigast, at seinastu fýra árini hava verið góð hjá fiskimonnum. Hetta merkir, at tey eisini hava verið góð hjá samfelagnum sum so, og hava vit enn einaferð fingið váttað, hvussu nær tengd gongdin í samfelagnum er at gongdini í okkara høvuðsvinnu**



NÝGGJÁRSGREIN
*Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag*

FF hevur sagt sáttmálan við Føroya Reiðarafelag upp. Sáttmálin varð seinast undirskrivaður í januar 1999 ella fyri skjótt 3 árum síðani. Ein orsøk til at ikki varð sagt upp í fjør var, at bíðað hevur verið eitt eini almennari pensjónslóggávu. Men henda tykist ikki at fara at koma.

Tískil er sáttmálin uppsagdur til 1. februar 2002. Tað er greitt, at nú ongar samráðingar hava verið í trý ár, er nóg mikið at taka upp við reiðararnar. Tað koma alla tíðina nýggir spurningar upp, sum greiða má fáast á. Men tað er givið, at uttan mun til lóggávu, so er neyðugt at fáa eina eftirlønarskipan, sum báðir partar – reiðarar og fiskimenn – skulu gjalda til.

Eitt annað mál, sum er upplagt at taka upp, er túralongdin. Sum er, kunnu menn haldast umborð í 4 mánaðar, og tað er eingin ivi um, at hetta er ov leingi. Ikki minst tá menn ofta als ikki sleppa at nerta land. Gongdin í farmaflotanum hevur jú í fleiri ár verið tann, at útmynstringartíðin hevur verið stytt. Har verður tað av øllum pørtum støðugt viðurkent, at teir siglandi eisini hava rætt til eitt heimalív, og tí er tíðin umborð stytt samsvarandi.

### Inntøkur fiskimanna 2001

Vit hava sum vant gjørt inntøkurnar hjá fiskimonnum upp fyri 2001, og verða tær fyri teir ymisku bólkarnar sammettar við undanfarin ár. Tí ber væl til at síggja, hvussu gongdin hevur verið yvir eitt longri tíðarskeið.

Tølini fyri 2001 eru tó ikki endalig, tí allar avrokningar náttúrliga ikki eru komnar. Men verður hugt eftir daginntøkuni, eru tølini so neyv, at tey kunnu siga greitt, hvussu gongdin er í árinum.

Tað er nevniliga daginntøkuni, sum hyggjast skal eftir. Um sammetast skal við lønarlagið á landi, so er ein dagløn hjá arbeiðara við 8 tímum íroknað frítíðarløn kr. 788. Tað, sum fiskimenn fáa útyvir hetta, er endurgjald teirra serstaka arbeiði, arbeiðstíð og annars fyri tær umstøður, sum er galdandi fyri teir, sum sigla.

Um gongdina í ár kann sigast, at hon yvirhøvur hevur verið góð. Veiðan hevur verið góð yvirhøvur, og tað sama hava prísirnir verið. Tó skal sigast, at tað hevur ikki gingist so væl hjá rækjuskipunum í ár, og er hetta fyrst og fremst orsakað av teimum lágu rækjuprísunum, men vónandi fara hesir at rætta seg aftur. Við nýggjum vinnum er tað ymist, sum tað hevur vignast. Tað ber soleiðis ikki enn til at siga, at umborðframleiðsla av svartkjafti gevur eina rímiliga úrtøku. Men hinvegin hevur hon givið mongum ungfólki møguleika fyri yvirhøvur at sleppa til skips.

Verður tikið samanum, kann sigast, at seinastu fýra árini hava verið góð hjá fiskimonnum. Hetta merkir, at tey eisini hava verið góð hjá samfelagnum sum so, og hava vit enn einaferð fingið váttað, hvussu nær tengd gongdin í samfelagnum er at gongdini í okkara høvuðsvinnu.

# ítróttur

Nr. 2 • fríggjadagur • 4. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Enska 3. deild

| | d | v | j | v t | t mál | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Plymouth | 25 | 15 | 7 | 3 | 36 | 15 | 21 | 52 |
| 2 Luton | 25 | 15 | 4 | 6 | 49 | 32 | 17 | 49 |
| 3 Mansfield | 24 | 13 | 5 | 6 | 38 | 26 | 12 | 44 |
| 4 Hull C. | 24 | 11 | 8 | 5 | 37 | 25 | 12 | 41 |
| 5 Rochdale | 24 | 11 | 7 | 6 | 34 | 27 | 7 | 40 |
| 6 Shrewsbury | 25 | 11 | 6 | 8 | 35 | 28 | 7 | 39 |
| 7 Cheltenham | 25 | 10 | 9 | 6 | 37 | 33 | 4 | 39 |
| 8 Scunthorpe | 24 | 10 | 8 | 6 | 42 | 28 | 14 | 38 |
| 9 Kidderm. | 23 | 10 | 5 | 8 | 27 | 21 | 6 | 35 |
| 10 Exeter | 25 | 9 | 7 | 9 | 27 | 39 | -12 | 34 |
| 11 R&D | 25 | 8 | 9 | 8 | 28 | 27 | 1 | 33 |
| 12 Hartlepool | 24 | 9 | 5 | 10 | 31 | 23 | 8 | 32 |
| 13 Southend | 25 | 9 | 4 | 12 | 29 | 30 | -1 | 31 |
| 14 Swansea | 25 | 8 | 7 | 10 | 33 | 37 | -4 | 31 |
| 15 Leyton O. | 25 | 8 | 6 | 11 | 38 | 41 | -3 | 30 |
| 16 Oxford Utd. | 25 | 7 | 8 | 10 | 33 | 33 | 0 | 29 |
| 17 Darlington | 23 | 8 | 5 | 10 | 27 | 32 | -5 | 29 |
| 18 Lincoln C. | 24 | 6 | 10 | 8 | 25 | 30 | -5 | 28 |
| 19 Bristol R. | 24 | 7 | 6 | 11 | 22 | 30 | -8 | 27 |
| 20 Macclesfield | 25 | 6 | 9 | 10 | 23 | 32 | -9 | 27 |
| 21 Torquay | 25 | 6 | 6 | 13 | 21 | 37 | -16 | 24 |
| 22 York | 23 | 6 | 5 | 12 | 27 | 41 | -14 | 23 |
| 23 Carlisle | 23 | 4 | 8 | 11 | 19 | 30 | -11 | 20 |
| 24 Halifax | 24 | 4 | 8 | 12 | 18 | 39 | -21 | 20 |

**Føroyskir leikarar:** Julian Johnsson (Hull C.)

# Sjómanskappingin

Sum kunnugt varð árliga sjómanskappingin í fótbólti hildin í KÍ høllini beint fyri nýggjár, har fótbóltsglaðir sjómenn kundu hita upp til aðalfundin.

Somikið væl hevur kappingin verið umtókt, at fiskamannafelagið í ár hevði gjørt av at flyta aðalfundin til kappingina fyri at fáa betri undirtøku, og undirtøkan til sjálva kappingina var eins stór, og hon vanliga er.

Tá avtornaði, hevði línu- og garnabáturin, Maskot av Toftum, vunnið kappingina, og vardu teir sostatt heitið, sum teir vunnu sær í 2000.

Á øðrum plássi kom trolbáturin, Varðin, av Viðareiði, meðan Morgunstjørnan av Eiði, sum vanliga roynir við línu, gjørdist nummar trý.

*-jm*



*Mascot av Toftum gjørdist aftur í vinnari av sjómanskappingini*



*Varðin av Viðareiði gjørdust akkurát ov stuttir, og máttu taka til takkar við øðrum plássinum*



*Morgunstjørnan av Eiði gjørdist hesa ferð nummar trý*

# Striltið hjá Hull

**Felagið hjá Julian tapti undan nýggjársleitinum, men hevur nú leitað sær styrk til seinnu kappingarhálvu**

ONGLAND
*Jákup Mørk*

Hull tapti fyri fimtu ferð í ár á útivølli, tá teir fyri nýggjár splædu ímóti Kidderminster, har navnframi Jan Mølby er venjari.

Mølby hevur millum annað gjørt sær dælt av »navni« sínum á tann hátt, at hann hevur fingið onkrar frægar danskar leikarar til felagið, og júst ein av hesum, Bo Henriksen, var maðurin, sum legði fyri við málskjótingini í fyrra hálvleiki.

Í seinna hálvleiki fullu tvey mál afturat, og bæði átti heimaliðið, so endaliga úrslitið av dystinum varð 3-0. Eitt tap, sum merkti, at Hull nú er á fjórða plássinum á stigatalvuni, har frástøðan upp til beinleiðis uppflytingarplássini gerst alsamt størri.

Annars skuldi Hull eisini spæla nýggjársdag, men orsakað av kava varð dysturin móti Hartlepool útsettur.

### Styrkja liðið

Tað verður ikki sagt, um tað eru væntandi úrslit, sum eru atvoldin, men í øllum førum hevur venjarin hjá Julian og teimum, Brian Little, nýtt høgtíðina til at styrkja sær um verjupartin.

Hull hevur gjørt sáttmála við 33 ára gamla australska verjuleikaran, Jason van Blerk. Van Blerk hevur áður leikt við Millwall, Manchester City, West Bromwich og Stockport, men sáttmálin við seinasta nevnda felagið er lokin, og tí skuldi Hull einki rinda fyri leikaran, sum í fyrsta umfari hevur fingið sáttmála fram til summar.

Van Blerk hevur áður leikt undir Brian Little, tá hesin var venjari í West Bromwich, og sigur nýggi leikarin, at tað fyrst og fremst er venjaranum at takka, at hann hevur gjørt av at koma til Hull at royna seg.

# Tveir málverjar til landsliðið

**Jógvan Martin Olsen hevur boðsent tveimum málverjum afturat til fyrstu landsliðsvenjingarnar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Landsliðshópurin, sum nú fer undir fyrstu venjingarnar til komandi undankapping, er nú komin upp á 27 mans.

Upprunaliga hevði Jógvan Martin Olsen, sum í løtuni tekur sær av úttøkuni, tikið 24 mans út, men síðani er Uni Arge lagstur afturat.

Beint undan jólum varð so greitt, at Jógvan Martin hevði tikið enn tveir leikarar út, og at talan í báðum førum var um málverjar. Nevnliga teir báðar Meinhardt Joensen úr KÍ og Trónd Vatnhamar úr B36.

Ein og Pól Næs Joensen úr HB, sum var í upprunaliga hópinum, teljast teir báðir millum nýggja ættarliðið av málverjum, sum í hesum árum gera seg galdandi í føroyskum fótbólti, og tað er lítið at ivast í, at venjarin við hesum hevur tikið atlit til spurningin um, hvør skal verja føroyska málið, tá teir báðir Jákup og Jens Martin eina ferð velja at leggja handskarnar á hillina.